Havnar leksikon:

# Anna Askham varð konfirmerað í 1915

**Í sambandi við at Anna Askham í Havn fylti 104 ár leygardagin 5. mars 2005, hava vit hesaferð valt at seta mynd av henni, og teimum hon bleiv konfirmerað sama við í 1915**



Konfirmantar í Havnar kirkju 11. apríl 1945. Aftara rað f.v.: Jacob Johannes Marius Olsen, Edvard Sverri Arge og Knud Petersen (Knút skómakarin).

Miðraðið f.v.: Jakob Evin Sonne Jakobsen, Johannes Anton Hansen, Haldur Christiansen, Anton Sofus Arge (Argir), Julian Johannesen og Johan Marius Frits Rubeksen (Johan í Smiðjustovu).

Fremra rað f.v.: Jane Susanne Margrethe Nikoline Justinussen, Elisabeth Johanne Poulsen, Andrea Susanne Alma Poulsen (fru Jørgensen á Hotel Føroyum), Anna Cathrine Mørkøre (Anna Askham), Maria Augusta Jensine Thomasie Vangsen og Elisabeth Johanne Christine Olsen.

Hesir tríggir vórðu eisini konfirmeraðir sama dag í Havnar kirkju, men eru ikki við á myndini: Mads Berg Frederik Andreasen, Hans Johan Simonsen, báðir av Velbastað, og Mads Vilhelm Thomsen úr Nólsoy.

*Mynd: Føroya Fornminnissavn*

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í sambandi við konfirmatiónsmyndina eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon: 314647 / 273168.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag


Vika 10, 2005
www.kaupthing.fo

# Nógv nýggj størv

MARKNAÐARRÁK

Tað komu 262.000 nýggj størv í USA í februar, tá sæð verður burtur frá landbúnaðinum. Tað var eitt sindur oman fyri tey mettu 225.000, og tað hægsta talið síðan oktobur í fjør. Tað vóru fáir dagpeningaumsøkjarar í februar, og álitistøl, sum vórðu kunngjørd fyrr í vikuni, bendu eisini á, at tað stóð væl til á arbeiðsmarknaðinum í februar. Í miðal eru komin 182.000 nýggj størv um mánaðin síðsta hálva árið, og tað er í tráð við ein búskap í jøvnum vøkstri.

Oljuprísurin var methøgur í farnu viku. Prísurin á evropisku brentoljuni var omanfyri 53 dollarar fyri tunnuna. Marknaðirnir óttast tó ikki høga oljuprísin í sama mun sum í heyst, mest tí íleggjarar eru sannførdir um, at tað er nógvur eftirspurningur heldur enn lítið útboð, sum trýstir prísin upp.

## Sveiggjandi lánsbrævarentur

Danska 10-ára rentan sveiggjaði millum 3,71% og 3,87% í farnu viku. Tað var orsakað av ymiskum væntanum um arbeiðsmarknaðarfrágreiðingina. Tað er áhugavert at renturnar lækkaðu, eftir at góða frágreiðingin varð kunngjørd. Tað var orsakað av, at hon vísti at lønirnar ikki hækkaðu í februar, og íleggjarar leggja tískil stóran dent á, at arbeiðsmarknaðurin ikki trýstir prísvøksturin upp í løtuni.

## Norrøn partabrøv á hægsta stigi í tvey ár

Partabrøvini hildu áfram at hækka í farnu viku. Norrøn partabrøv eru nú hækkaði um 7% higartil í ár, og tað er oman fyri sjálvt tær mest bjartskygdu metingarnar. A. P. Møller-Mærsk, sum stendur fyri triðinginum av danska KFX-vísitalinum, er hækkað heili 24%. Spurningurin er nú, nær íleggjarar fara at staðfesta nakað av hesum vinningi, so kurshækkingarnar steðga.

## Hesa vikuna

Tað mest áhugaverda lyklatalið hesa vikuna verður amerikanski handilsjavnin fyri januar. Marknaðirnir vænta eitt undirskot á 56 mia. dollarar, eins og tað var í desembur. Um tað verður størri, viknar dollarin væntandi frá teimum 1,32 fyri hvørja evru, sum hann er verdur í løtuni.







**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 5,62 | 0,1% | ↑ |
| JPY | 5,37 | 0,5% | ↑ |
| GBP | 10,81 | 0,2% | ↑ |
| NOK | 0,90 | 0,2% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,91 | 0,1% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 171,09 | -0,3% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 92,68 | 2,4% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 61,79 | 1,4% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*